# 266-b

**Hetta er nógv umstrídda grein 266-b í revsilógini. Tað, sum hendi í jólamánaðinum í 2006, var, at "eller seksuelle orientering" varð knýtt upp í lógargreinina, sum nú er soljóðandi:**

**Den, der offentligt eller med forsæt til udbredelse i en videre kreds fremsætter udtalelse eller anden meddelelse, ved hvilken en gruppe af personer trues, forhånes eller nedværdiges på grund af sin race, hudfarve, nationale eller etniske oprindelse, tro eller seksuelle orientering, straffes med bøde eller fængsel indtil 2 år.**



### 266-B OG SAMKYND

*Jenis av Rana sigur, at Miðflokkurin fer at gera alt, sum stendur í hansara makt, at reinsa grein 266-b í revsilógini fyri samkynd og allar aðrar navngivnar samfelagsbólkar.*

*Hann hann sær ein góðan møguleika fyri tí, nú landsstýriskvinnan í innlendismálum ætlar at leggja 266-b aftur fyri Løgtingið*

» **Tað er óneyðugt at nevna nakran yvirhøvur**

# 266-b aftur á breddan

Í kjalarvørrinum á Facebook-álopinum frá sonevnda Hans Davidsen á brekað, segði Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, við Rás2, at kanska er stundin komin til at broyta grein 266-b í revsilógini so at hon eisini umfatar fólk við breki.

Hon tekur málið í ramasta álvara, og staðfestir, at landsstýrið nú fer at taka málið upp.

Í hesum sambandi skal ein bólkur av serfrøðingum setast í heyst at geva landsstýrinum tilmæli um etiska partin av revsilógini, sum hon málbar seg.

# Í hondunum á løgtinginum

Tey eru nógv sum eru rættiliga trygg við, at tey samkyndu verða ikki tikin burtur úr grein 266-b í revsilógini aftur. Tað eru tey, tí tey halda, at revsilógin er donsk og at danskir myndugleikar fara at strika samkynd úr aftur lógini.

Hesi fólk høvdu grein í sínum máli - men bara til 1. mars í ár, tí tá varð revsilógin yvirtikin er er nú føroyskt málsøki burturav. Sostatt stendur tað nú fult og heilt til løgtingið at gera av, hvussu revsilógin í Føroyum skal vera. Tað verður tí Løgtingið einsamalt, sum ger av um samskynd skulu strikast í revsilógini, ella ikki og um brekað skulu fáa innivist í henni ella ikki.

# Stór skomm fyri Føroyar

- Lat nú tey samkyndu fáa frið at verða nevnd í grein 266-b í revsilógini.

Tað er ynskið hjá Albert O.S. Johannessen, sum er formaður í føroyska felagnum fyri samog tvíkynd, Friðarboganum.

Hann hevur onki ímóti at brekað eisini fáa innivist í 266-b, men hann mælir staðiliga frá at tey samkyndu verða tikin burtur úr.

Hann ivast ikki í, at kemur lógin fyri Løgtingið aftur, fer ein roynd at verða gjørd at fáa tey samkyndu strikað úr 266-b.

Men hann vónar, at Løgtingið er so mikið at sær komið, at tað ikki bakkar aftur.

Hann ivast heldur ikki í, at skuldi tað hent, at samkynd verða strikað í lógini, hevði tað verðið ein so stór skomm fyri Føroyar, at tað hevði fingið rúmd í altjóða fjølmiðlunum.

- So hevði løgtingið vanvirt seg sjálvt, heldur hann.

Hann stúrir annars ikki fyri, at orðavalið ímóti samkyndum fer at vera líka hvast aftur, sum tað var í samband við at 266-b varð broytt upp undir ársenda í 2006.

- Nú er lógin broytt, so at hon eisini umfatar samkynd. Sostatt forðar lógin fyri, at samkynd verða niðurgjørd á sama hátt, sum vit upplivdu tá, tí nú er slíkur málburður nú beinleiðis revsiverdur, sigur hann.

» **Tað hevði verðið stór skomm fyri Føroyar**

# Neyðugt at seta navn á

Skal ein ávísur bólkur í samfelagnum hava serliga verju, er tað neyðugt at nevna hann beinleiðis í revsilógini.

Tað staðfestir Páll Lassen, løgfrøðingur.

Tað eru mong sum halda, at tað er onki endamál í at nevna ávísar bólkar í revsilógini, sum tað er revsivert at gera seg inn á.

Tí halda tey, at grein 266-b í revsilógini er óneyðug.

Men Jógvan Páll Lassen staðfestir, at fyri at nakað skal vera revsivert, skal tað vera heilt nágreiniliga eyðmerkt.

Hann sigur, at fyri at nakað skal vera revsivert, skal tað sostatt beinleiðis verða nevnd í revsilógini.

» **Tað er vónleyst at siga, hvar vit enda**

- Revsilógin kann ikki siga, at siga, at tað revsivert at mála við ljótum liti-fyri at skera tað út í papp.

Tað má nágreiniliga útgreinast, hvat ein ljótur litur er.

Upp á saman máta má tað eisini vera nágreiniliga ásett í revsilógini, hvønn tað er ólógligt at tala ella skriva niðrandi um.

- Tí er neyðugt at teir samfelagsbólkarnir verða nágreiniliga nevndir, sum tað er revsivert at niðra í skrift og í talu.

Men Jógvan Páll Lassen sigur, at tað er sjálvandi ein politiskur spurningur, hvussu langt farast skal og, hvussu nógvir samfelagsbólkar skulu nevnast.